# Eg elski bøkur, norðurlendskar bøkur...

**Orðini frá norðurlendsku rithøvundunum, sum fyltu Klingruna leygardagin, raktu antin í sínum tvítýdningi, ella við síni serligu samanseting, beinrakin kendar kenslur av kærleika og tráan, settu spurningar um samleika og vesturlendska uppfatan af heiminum og fingu okkum at smílast yvir tað absurda í dagligdegnum**



*Tríggir av teimum fimm valevnunum, sum lósu upp í Norðurlandahúsinum leygardagin. Frá vinstru danin Ib Michael, føroyingurin Tóroddur Poulsen, grønlendarin Ole Korneliussen. Tveir av luttakarunum eru ikki við á myndini, og tey eru Kari Aronpuro úr Finnlandi og Eva Runefelt úr Svøríki*

*Mynd: Finnur Justinussen*

MENTAN

*Marjun Dalsgaard*

»Eg elski bøkur« ljóðaði røddin hjá Bubba úr hátalarunum í Klingruni leygardagin. Bubbi Mortens var harvið tað íslendska íslettið í tí norðurlendska tiltakinum í Norðurlandahúsinum, har norðurlendski samleikin kendist fjálgur, tá fimm av teimum 13 rithøvundunum, sum eru útnevnd til Norðurlendsku Bókmentavirðislønina í ár, lósu upp yrkingar og brot úr skaldsøgum teirra. Tvær skaldsøgur og trý yrkingasøvn, sum eru millum tey 13, ið eru mett, at vera tey bestu, sum eru skrivaði í norðurlondum í dag, vórðu her lisin upp, og tað var ikki heilt frítt, at tað var ein hátíðarligur dámur yvir løtuni. Tað var í sambandi við eina rundferð kring norðurlendsku høvuðsstaðirnir, at rithøvundarnir og yrkjarirnir vóru í Norðurlandahúsinum. Tíðin fleyg meðan yrkingar og brot úr skaldsøgum vóru lisin upp. Evnini vóru universel: Kærleiki, tráan, arbeiði, samleiki, tað dagliga, heimsáskoðan og menniskjaáskoðan, sæð gjøgnum eyguni hjá norðurlendskum heimsborgarum. Lisið upp á svenskum, finskum, grønlendskum, føroyskum og donskum.

Tí var hetta tiltak, sum minnur okkum á, at vit hoyra saman, eisini við til at minna okkum á, at vit eru ymisk. Vit hava ymisk mál og ymiska fortíð, sum hevur givið okkum ymiskar leiklutir bæði í sambandi við umheimin og hvønn annan, men kortini ein felags norðurlendskan samleika. Endamálið við norðurlendsku bókmentavirðislønini er at styrkja norðurlendskar bókmentir og norðurlendskan samleika, at læra norðbúgvar at kenna norðurlendskar bókmentir.

### Føroyskt yrkingasavn útnevnt

Føroyskar bókmentir eru ikki altíð umboðaðar tá Norðurlendska Bókmentavirðislønin verður latin, men millum valevnini í ár er havnarmaðurin Tóroddur Poulsen við sínum yrkingasavni »Blóðroyndir,« sum Ebba Hentze hevur týtt til danskt. Eins og nærum alt annað, ið kemur frá Tóroddi Poulsen, er heitið á yrkingasavninum tvískilt. Tað, ið serliga eyðkennir yrkingarnar hjá Tóroddi er spælið við tvítýddum orðum og undirskiltum týdningum. Til tíðir speiskliga, til tíðir alskin kann hann, við einari einstakari reglu, ella einum vælvaldum orði, síðst í eini yrking gera vart við tað undarliga, býttisliga, stuttliga ella absurda í tí dagliga, sum vit vanliga ikki hugsa um. Tveir føroyingar hava fyrr fingið Norðurlendsku Bókmentavirðislønina, í 1965 fekk William Heinesen hana fyri skaldsøguna »Det gode håb« og í 1986 fekk Rói Paturson virðislønina fyri yrkingasavnið »Líkasum.«

### Londini velja sjálv

Tað er upp til einstøku londini, um tey velja at útnevna nakran av sínum rithøvundum, sum valevni til Norðurlendsku Bókmentavirðislønina. Í Føroyum er tað sostatt Rithøvundafelag Føroya, ið stendur fyri hesum. Tær smærru natiónirnar í norðurlondum eru sum heild ikki væl umboðaðar, men í ár eru ritverk frá bæði Grønlandi, Samum og Føroyum við. Tískil eru 13 skaldsøgur og yrkingasøvn útnevnd í ár, men ofta eru einans 10, nevniliga tvey úr ávíkavíst Danmark, Finnlandi, Svøríki, Noreg og Íslandi, men sum Gunnar Hoydal segði, tá hann beyð vælkomin, er norðurlendska mentanin umfatað av øðrum málum og mentaðum enn frá hesum fimm. Norðurlendska Bókmentavirðislønin hevur verið latin síðan 1962 og er endamálið at styrkja norðurlendska bókmentan. Virðisløning er á 350.000 danskar krónur, hartil kemur at ritverkini verða týdd til onnur norðurlendsk mál. Endamálið er, at norðurlendskar bókmentir verða betur umboðaðar í norðurlondum. Ofta verða norðurlendsk ritverk týdd til stóru heimsmálini, men ikki til onnur norðurlendsk mál. Tað er týdningarmikið at norðurlendskar bókmentir koma út um landaoddarnar, men eisini at tær koma inn um hjá hvørjum øðrum, so at norðbúgvar læra at kenna og kansk elska norðurlendskar bókmentir.



*Yrkingasavnið »Blóðroyndir« hjá Tóroddi Poulsen er útnevnt av Føroya Rithøvundafelag, til at verða millum tey ritverk, ið eru valevni til Norðurlendsku Bókmentavirðislønina*

*Mynd: Finnur Justinussen*

## Ritverk útnevnd til Norðurlendsku Bókmentavirðislønina:

| | |
|---|---|
| Danmark: | Klaus Høeck »In nomine”« Yrkingar |
| | Ib Michael »Kejserens Atlas« Skaldsøga |
| Finnland: | Kari Aronpuro »Pomo:n lumo« Yrkingar |
| | Ulla-Lena Lundberg, »Marsipansoldaten« Skaldsøga |
| Ísland: | Mikael Torfason, »Heimsins heimskasti pabbi« Skaldsøga |
| | Gyrðir Eliasson , »Gula húsið« Stuttsøgur |
| Noreg: | Lars Saabye Christensen, »Halvbroren« Skaldsøga |
| | Hans Herbjørnsrud, »Vi vet så mye« Stuttsøgur |
| Svøríki: | Eva Runefelt, »I djuret« Yrkingar |
| | Peter Kihlgård, »Du har inte rätt att inte älska mig« Skaldsøga |
| Føroyar: | Tóroddur Poulsen, »Blódroyndir« Yrkingar |
| Grönland: | Ole Korneliussen, »Saltstøtten« Skalsøga |
| Samiska málið: | Kirsti Paltto »Suoláduvvon« (»Det tapte«) |



# Pætur var sum ein dreymur



*— Eg kendi meg væl á pallinum. Eg roknaði við, at eg fór at fáa nervar, áðrenn eg skuldi syngja, men teir stóru nervarnir komu ongantíð, sigur Pætur við Keldu*

**Pætur við Keldu tveitti allar nervar av sær, og gav millióna stórari danskari hyggjarfjøld eina flotta framførslu. Sangurin var vakur og tóktist koma beint frá hjartanum. Pætur var sera væl nøgdur við sítt avrik, hóast hann ikki vann kappingina**

GRAND PRIX

*Orð: Eyðun Klakstein,*
*Myndir: Jens Kristian Vang*



**Keypmannahavn:** Pætur var stinnur sum ein klettur, tá hann fór á pallin í Cirkusbygninginum leygarkvøldið.

Frammanfyri sær hevði hann eini 1600 fólk í salinum, men upptøkutólini varpaðu hansara framførslu út til einar tvær milliónir hyggjarar.

Hetta nervaði tó á ongan hátt føroyska tónleikaran, sum sannførandi stíli sang sangin um dreymin. Som en drøm. Og tað gjørdist ongantíð nøkur marra. Pætur sang frálíka væl, hann var tryggur undir allari framførsluni, og hann livdi seg væl inn í sangin.

— Eg kendi meg væl á pallinum. Eg roknaði við, at eg fór at fáa nervar, áðrenn eg skuldi syngja, men teir stóru nervarnir komu ongantíð. Eg eri sera glaður fyri, at eg kundi njóta løtuna, tá eg sang. Tað hevur nógv at siga fyri meg, sigur Pætur við Keldu.

— Tá eg kom á pallin og fekk fatur í mikrofonini, var eg púra róligur. Tú skalt geva fólki nakað teir minuttirnar, tú syngur, og tað legði eg meg eftir. Ert tú bangin ella ótryggur, so avdúkar sjónvarpið teg beinanvegin, men ert tú hinvegin róligur og avslappaður, so sæst tað eisini.

Politiken umrøddi í sunnudagsblaðnum aðalroyndina til Grand Prixið, sum var fríggjakvøldið. Teir bitu merki í, at Pætur stóð við hondunum í lumma — púra róligur — meðan hann bíðaði eftir, at alt skuldi vera klárt hjá honum at fara í gongd. Og tá tónleikurin so fór í gongd, so var hann beinanvegin klárur at syngja og gjørdi tað trygt.

### Væl nøgdur við avrikið

Nei, tað var einki, sum tók klaksvíkingin á bóli, tá hann tók lut í Grand Prixnum. Óttin fyri stóru avbjóðingini gjørdist ongantíð veruleiki, og Pætur kom væl burturúr sínum framførslum.

— Eg eri als ikki keddur av, at eg ikki vann. Fyri meg ráddi tað um, at eg skuldi gera tað gott, og tá eg kom av pallinum eftir fyrru framførsluna, var eg glaður, tí eg hevði nátt málinum. Alt gekk uppá stás, og so hevði eg ikki brúk fyri meira, greiðir Pætur frá.

— At so eisini slapp við til finaluna, var gott at fáa afturat, tí so visti eg, at okkurt lá eftir framførsluna. Samanumtikið er eg sera væl nøgdur við mítt avrik. Eg haldi, at eg gjørdi vart við meg, og nú vóni eg, at hetta kann lata nakrar dyr upp.

Pætur fekk góða móttøku frá fólkunum, sum høvdu fingið sess í Cirkusbygninginum, og meðan melodiøsi og vakri sangurin hjá Pætur ljómaði úr hátalarunum, tendraðu fólk ljós í salinum, og tað var eisini nakað, sum hjálpti Pæturi á pallinum.

### Dygd og stílur

Sangurin hjá Pætur var eingin typiskur Grand Prix sangur. Hann var helst ov friðarligur til at vinna kappingina, men hinvegin var hetta júst ein sangur, sum vísti dønum, hvat Pætur stendur fyri, og hvat hann er førur fyri at avrikað.

Tónleikurin domineraði á ongan hátt, og tað var gjørd við beráddum huga, tí ætlanin var, at góða røddin hjá Pæturi skuldi verða tððulig. Við systur síni, Tóru, og kórsangarum afturat stóð røddin hjá Pæturi sterk í myndini allatíðina.

At sangurin so eisini varð valdur út til finaluna, var eitt stórt herðaklapp til Pætur, og fólk skulu leggja minni í, at hann ikki fekk fleiri stig. Tað tóktist sum danir framvegis leitað eftir einum ávísum slagi av sangi, sum skal umboða teir í europeisku finaluni.

Pætur slapp undan at gera vart við seg á nakran plattan hátt. Hann hevði stíl, sangurin var øðrvísi enn allir hinir, og framførslan var framúr góð. Nú føroyingar aftur fingu umboð við til Grand Prixið, var tað eitt gott umboð, sum vit fingu við,

Sangurin og framførslan hjá Pæturi hevði dygd og stíl. Og tað finnur langt frá í øllum sangunum, sum eru við í Grand Prixnum.

Pætur fekk nógv góð orð við á vegnum, og tað sást eisini aftur, tá ein rúgva av fólki við tilknýti til Grand Prixið hittust í Parkini eftir Grand Prixið. Pætur var ein populerur maður, og meðan aðrir av luttakarunum sótu friðarligir í stólum í gongini, vóru tað nógv, sum vildu heilsa upp á føroyska luttakaran í kappingini.

Pætur stóð royndina við rós, og nú ræður um at smíða, meðan jarnið er heitt.